# Runavíkingar aftur í finaluni



*Hóast ÍF noyddist at lúta 2-3 fyri NSÍ á Varmakeldu, so sýndu teir stak góðan hugburð, eftir at hava verið aftan fyri 0-3, og tað eigur at geva vónir undan seinnu helvt av landskappingini.*

**Hóast tað leikaði hart á seinastu løtuna, eydnaðist tað NSÍ at basa fuglfirðingum á Varmakeldu og harvið spæla seg í steypafinaluna**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

ÍF skifti í farnu viku venjara. Sigfríður Clementsen var koyrdur úr starvi, og fyribils er Petur Mohr settur at taka sær av liðnum. Bert tríggjar dagar eftir at Petur Mohr tók við, leiktu fuglfirðingar hálvfinalu í steypakappingini ímóti NSÍ.

### Javnur fyrri hálvleikur

Fyrri hálvleikur í Fuglafirði leygarkvøldið var rættuliga javnur. Bæði liðini vistu gott spæl, men runavíkingar høvdu eina lítla yvirvág. Tað var eisini NSÍ, sum legði seg á odda, tá ið komið var til umleið miðjan fyrra hálvleik. Eftir gott uppspæl í vinstru síðu endaði bólturin hjá Helga L. Petersen, og vandamikli framherjin langaði til við einum góðum langskoti, og bólturin fór í netið. Hetta málið noyðist ÍF-málverjin, Karstin Joensen, allarhelst at taka á sínar herðar. Hetta var fyrsti veruligi málmøguleikin hjá runavíkingum í dystinum, og tí kom tað dátt við hjá fuglfirðingum.

Eftir leiðslumálið hjá NSÍ umskipaði Petur Mohr liðið hjá ÍF nakað í verjupartinum. Hetta gav eisini meiri tryggleika í verjupartinum, og fuglfirðingar komu fyri seg. Spælið koyrdi betur, enn tað hevur gjørt leingi, og runavíkingar fingu harða mótstøðu.

### Tvær ferðir Andy

Nú Sjúrður Jacobsen hjá NSÍ hevði leikbann í dystinum ímóti ÍF, var Jónstein Petersen fluttur aftur av sínum vongplássi til at leika sum vinstri bakkur, og tískil kom Andy Olsen inn á liðið á vinstra vong. Andy royndist væl, tá ið hann kom inn í dystinum mikukvøldið ímóti HB í Havn, og leygarkvøldið tók Andy veruliga av møguleikanum, nú hann slapp at royna seg frá byrjan.

Hóast fuglfirðingar vóru byrjaðir væl eftir steðgin, so vóru tað tó NSÍ, sum enn einaferð fingu bóltin í kassan. Hetta hendi, tá ið NSÍ einar tíggju minuttir eftir steðgin fór í kontraálop, og Andy Olsen streyk avstað í vinstra borði, og tá ið hann nærkaðist málinum hjá Karstin Joensen og ÍF, langaði hann til úr spíksum, og so vóru gestirnir úr Runaík bráddliga á odda 2-0.

Mótbrekkan hjá ÍF var nú enn tyngri, og hon skuldi vísa seg at gerast óyvirkomulig. Aftur hesaferð var tað Andy Olsen, ið var upp á spæl. NSÍ spældi seg væl fram eftir vøllinum, og eitt gott innlegg kom úr høgra borði. Andy Olsen kom rennandi úr vinstra borði, og hann smekkaði til, og bólturin sang í netinum aftan fyri Karstin Joensen, sum ongan livandi møguleika hevði at bjarga.

### Vónin kveiktist aftur

Fuglfirðingar góvu tó ikki skarvin yvir, og teir eiga rós uppiborið fyri at sýna góðan stríðsvilja. ÍF sendi nógv fólk fram, og teir fingu lagt eitt stórt trýst á málið hjá Jens Martin Knudsen og NSÍ. Tað eydnaðist eisini ÍF at minka um munin, tá ið Bartal Eliasen skoraði eftir trunkaspæl framman fyri NSÍ málinum. ÍF bleiv við at trýsta, og møguleikarnir vóru nógvir. Tað skuldi tó eitt einastandandi einmansavrik til, áðrenn ÍF fekk minkað um munin enn einaferð. Veteranurin Magni á Lakjuni snýtti fleiri verjuleikarar hjá NSÍ við sínum framúr teknikki, áðrenn hann sendi bóltin í netið til 2-3. Nú kom lív í áskóðarafjøldina á Varmakeldu, og teir fimm minuttirnir, ið eftir vóru at leika, trýsti ÍF óført. Hóast málmøguleikarnir ikki trutu, eydnaðist tað ikki ÍF at javna, og við 3-2 sigrinum hevur NSÍ spælt seg í steypafinaluna, sum verður á Tórsvølli á Ólavsøku. Mótstøðuliðið í finaluni verður HB, og tískil verður finalan ein endurtøka av finaluni fyri tveimum árum síðani, tá ið NSÍ vann 2-1. Um úrslitið eisini verður ein endurtøka, vil tíðin vísa, men tað hava runavíkingar so neyvan nakað ímóti.

### ÍF-NSÍ 2-3(0-1)

0-1 Helgi L. Petersen
0-2 Andy Olsen
0-3 Andy Olsen
1-3 Bartal Eliasen
2-3 Magni á Lakjuni

STARVSLÝSING

Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi e.l. til havnadeildina. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.

Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, fevna eitt nú um:
• hald og rakstur av havnum og lendingum
• fakeftirlit við verkætlanum
• eftirlit við vitum
• mátingar og kanningar

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við líknandi tekniskari útbúgving – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum. Harafturat kundu vit hugsað okkum, at umsøkjarin hevur góðan edv-kunnleika.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
FO 110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. juli 2004. Brævbjálvin eigur at merkjast "Verkfrøðingur e.l. til havnadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 311 333, lokal 316, e-postur: ek@lv.fo ella fartel. 540 861

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land



# Todi og liðfelagarnir komnir



*Fyrrapartin mánadagin vandu Todi Jónsson og liðfelagar hansara úr FC Keypmannahavn á Tórsøvlli í Havn, áðrenn leiðin gekk til Klaksvíkar, har teir seinni mánadagin skuldu dystast við KÍ*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Føroyski landsliðsleikarin Todi Jónsson og liðfelagar hansara úr FC Keypmannahavn komu til Føroya sunnudagin. Mánamorgunin vandu teir á Tórsvølli**

FCK-VITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Liðið hjá Toda Jónsson, FC Keypmannahavn, er komið til Føroya við sterkastu manning. Tá ið liðið vandi á Tòrsvølli fyrrapartin mánadagin, sást, at kendi suðurafrikanski framherjin, Zuma, ikki er førur fyri at spæla enn. Hinvegin tykist allir hinir leikararnir at verða væl fyri.

### Í Klaksvík í gjárkvøldið

Zuma segði við Sosialin, at hann hevur ein skaða at dragast við, og tí fer hann ikki at verða við í nøkrum av dystunum, meðan vitjað verður í Føroyum. Hann venur tó fyri seg sjálvan, meðan liðfelagarnir venja við bólti, so at hann kann verða klárur, tá ið danska kappingin byrjar aftur um fáar vikur.

FC Keypmannahavn spældi í gjárkvøldið eftir evstamark hjá blaðnum í Klaksvík ímóti KÍ, og í annaðkvøld verður dystur í Havn ímóti HB.

Í hópinum hjá FC Keypmannahavn á Føroyavitjanini eru 22 leikarar, sum tað eisini sæst aðrastaðnis á síðuni. Millum teir 22 leikararnar eru tveir nýggir, sum FCK hevur fingið í summar. Tað eru finski landsliðsleikarin, Janne Saarinen, ið er verjuleikari, sum FCK hevur keypt í týskum fótbólti, og so ungi miðverjin Dan Thomassen, sum seinnu árini hevur leikt í Italia.

**Hópurin hjá FC Keypmannahavn:**
Peter Møller
Dan Thomassen
Jesper Bech
Martin Bergvold
Peter Christiansen
Benny Gall
Lars Jacobsen
Todi Jónsson
Hjalte Nørregaard
Balazs Rabocki
Thomas Røll
Urmas Rooba
Alvaro Santos
Michael Silberbauer
Bo Svensson
Janne Saarinen
Christian Traore
Bora Zivkovic
Sibusiso Zuma
Morten Bertolt
William Kvist Jørgensen
Ole Tobiasen

Venjari er Hans Backe

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk




0,- kr/mb

frá kl. 24-08 allan juli

Allan juli mánað kunnu allir privat I-net breiðbandkundar hjá okkum sverma og downloada og fyri okkara skuld ríða og rógva so langt teimum lystir ókeypis á alnetinum millum midnátt og 8 á morgni..!

*Góða nátt...*

I·net BREIÐBAND

**Um tú ikki longu hevur I-Net Breiðband so ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

FØROYA TELE

*Tilboðið er treytað av at tú hevur I·net breiðbandhald frá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi frá 1 . juli til og við 31. juli 2004.*

petur & petur • 320870